## Ræddir roykjarar leggja av

Eitt danskt sjónvarpsátak, sum hevur til endamáls at ræða fólk frá at roykja, hevur fingið nógvar roykjarar at hugsa seg um. Boðskapurin í átakinum er, at hvør einasta sigarett er skaðilig, og hann hevur virkað, skrivar DR. Síðani átakið byrjaði, hava umleið 1.200 fólk ringt til ta serligu tænastuna, sum hjálpr fólki, sum vilja hava hjálp til at gevast at roykja, og tað er 10 ferðir fleiri enn frammanundan. Jacob Axel Nielsen, heilsumálaráðharri, væntar, at fleiri slík átøk við ógvusligum og ræðandi myndum koma afturat seinni. Hagtøl vísa, at ein triðingur av teimum, sum ringja til ta serligu hjálpartænastuna, leggja av at roykja.



## Tað triðja heimsveldið

Danski uttanríkisráðharrin, Per Stig Møller, heldur, at ES eigur at hava líka stóran týdning á altjóða pallinum sum USA og Kina. Vit eiga ikki at tosa um G2, men heldur um G3, segði hann. Á tíðindafundi í Bruxelles í gjár segði uttanríkisráðharrin, at tá hugsað verður um, hvussu stóran marknað ES hevur, og hvussu stóra hermegi limalondini hava, so er tað ikki annað enn rímiligt, at samveldið er at rokna sum tað triðja heimsveldið. Hann segði seg vera sannførdan um, at ES eigur at hava ein nógv størri leiklut í heimspolitikkinum enn nú.

# Kringvarpið kreppufund um sjónvarpið

*Hetta er skrivið, 28 av 29 fólkum, sum arbeiða við sjónvarpi í Kringvarpinum, hava sent til stýrið fyri Kringvarpið fyri at vísa sína støðu*

**Leiðslan í Kringvarpinum hevur ikki skil fyri sjónvarpi og kann leiðslan ikki skapa frið, má hon leggja frá sær. 28 av 29 í sjónvarpinum rópa neyðarróp til Kringvarpsstýrið. Tey vilja sleppa at gera sjónvarp, men hava ongar ressursir. Seinnapartin mánadagin verður kreppufundur í Kringvarpinum**

SJÓNVARP
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

28 starvsfólk hjá Kringvarpi Føroya hava sent neyðarróp til stýrið fyri Kringvarpið og avrit av neyðarrópinum til Anniku Mittún Jacobsen, Kringvarpsstjóra, Helenu Dam á Neystabø, landsstýriskvinnu í Mentamálum og Løgtingsins mentanarnevnd, at tey aftur vilja sleppa at gera sjónvarp.

Tey 28 starvsfólkini siga stutt og greitt, at samanleggingin av stovnunum hevur verið ein katastrofa fyri sjónvarpið.

Víðari greiða tey frá ymiskum viðurskiftum, sum tey ikki halda vera nøktandi, og hava uppskot til, hvussu hetta skal broytast.

### Stýrið sær álvaran

Rúni Heinesen, formaður í stýrinum fyri Kringvarpið, staðfestir, at hetta er eitt mál, sum verður tikið í størsta álvara.

– Mánadagin hava vit fund um viðurskiftini, har leiðsla og starvsfólk vera við, so vit kunnu fáa greiðu á, hvat bagir sjúklinginum, sigur Rúni Heinesen.

Hann leggur afturat, at tað ikki er nakað nýtt, at arbeiðsviðurskiftini í sjónvarpinum eru verri enn hjá øðrum, og at Kringvarpið hevur ov lítið av peningi.

Høgni í Jákupsstovu, ein av teimum 28, sum hevur skrivað undir, umframt at tað er hann, sum hevur sent teldubrævið til stýrið, skilir væl, at peningur manglar, men heldur ikki, at tað er ein umbering fyri øllum.

– Tingini, sum ikki kosta pening verða heldur ikki gjørd. Tað eru ongar ætlanir og visjónir, hóast leiðslan hevur sitið í eitt og eitt hálvt ár, sigur hann, og leggur afturat, at hóast bygnaðurin er gjørdur til 90 milliónir krónur, so er veruleikin bara 60 milliónir, og tí er tað løgið, at mann ikki vil broyta bygnaðin.

### Raðfesting

Fremsta ynskið hjá starvsfólkunum í sjónvarpinum er at fáa økið raðfest, men hetta kann Rúni Heinesen ikki garantera.

– Í 2008 hevði Kringvarpið 68 milliónir tilsamans. Til framleiðslu í útvarpinum vórðu nýttar 12,8 milliónir og sjónvarpið nýtti 21,3 milliónir krónur. Har hevur tú lutfallið, og so kunnu fólk sjálvi meta um raðfesting, sigur hann, og leggur afturat, at tað er stjórin, sum er fult álit er á, sum situr við ábyrgdini.

Høgni í Jákupsstovu er ikki heilt samdur við Rúna Heinesen.

– Eg tími illa í eina diskutión við stýrið, men mann plagar at siga, at sjónvarp er sjey ferðir dýrari at gera enn útvarp, so kann eg siga sum formaðurin í stýrinum. Har hevur tú lutfallið.

Høgni í Jákupsstovu leggur afturat, at tað, sum tey føla, er at tað einasta, sum verður framleitt, er Dagur og Vika, 3-2 og nakrar dokumentarsendingar. Hetta er munin minni enn áðrenn samanleggingina.

### Samskifti

Rúni Heinesen vísir á, at tað er líkt til, at ov lítið samskifti er í nógvum førum, og hesum tekur Høgni í Jákupsstovu undir við.

– Sjónvarp er nakað mann ger saman, men vit eru býtt upp í tríggjar ymiskar deildir í mun til tvær, so múrarnir eru bara blivnir hægri. Samstundis situr leiðslan í Sortudíki og vit vita ikki eingong, hvat ymisku pengarnir verða nýttir til.

Mánadagin verður so fundur millum starvsfólk, leiðslu og stýri.

Tórshavn 22. oktober 2009

Til stýrið fyri Kringvarp Føroya
Avrit til: Anniku Mittún Jacobsen, landsstýriskvinnuna í Mentamálum og Løgtingsins mentanarnevnd.

**Sjónvarpið bløðir út**

**Síðani nýggja leiðslan tók við, er sjónvarpstilfarið í Kringvarpinum minkað almikið. Nú, tá ið kringvarpsstjórin hevur avgjørt at taka sjónvarpstíðindasendingina av skrá millum jól og nýggjár fyri at spara pengar, ber av. Annaðhvørt má sjónvarpið uppraðfestast, ella mugu stovnarnir fara sundur aftur.**

Starvsfólkini í Sjónvarpinum eru von við buldraslig viðurskifti. Sjónvarp Føroya hevur altíð verið eitt arbeiðspláss, har tað hevur verið kjakast nógv, har bylgjurnar ganga høgt og eitt arbeiðspláss, sum hevur kravt nógv av sínum starvsfólkum. Men nú er øskukalt í sjónvarpinum. Tann samanleggingin, sum skuldi geva meira synergi, sum skuldi fáa meira burturúr hvørjari krónu og økja um programtilboðið í Kringvarpinum, hevur verið ein vanlukka fyri sjónvarpið.

Leiðslan hevur ikki orðað nakra visjón fyri sjónvarpið, sjálvt um tað vanliga er, at ein orðað visjón ella í minsta lagi eitt hugskot um kós, mál og mið er sjálvt grundarlagið undir setanini av eini leiðslu. Við hesum í tonkunum undrast vit stórliga á, at stjórin hevði nýggja bygnaðin tøkan stutt eftir, at hon var byrjað í starvinum 1. apríl 2008. Afturvendandi messan um, at stovnurin ikki er lønarkompenseraður í áravís, kann ikki brúkast til nakað, og tann støðan var kend av øllum, áðrenn fyrst stjórin og síðani restin av leiðsluni tóku av teirra størvum.

Vit krevja, at broytingar verða settar í verk beinanvegin. Vit krevja, at vit sleppa at gera sjónvarp, og vit krevja, at vit kunnu røkja okkara demokratisku skyldur. Vit krevja, at verða loyst úr rokniarkshaftinum hjá stjóranum.

Vit hava fleiri ítøkilig uppskot um broytingar:

- Tað eru tríggjar sjónvarpsframleiðandi deildir, og tað er alt ov mikið. Tey fáu starvsfólkini, sum arbeiða við sjónvarpi, eru ov spjadd, og múrarnir millum deildirnar eru hægri enn nakrantíð. Vit skjóta upp at taka bygnaðin upp til nýggja viðgerð, soleiðis at tað verða í mesta lagi tvær sjónvarpsframleiðandi deildir.
- Fylgið lógarinnar bókstavi, tá tað um tíðindadeildina ræður. Tað skapar ov mikla órógv at royna at trossa politiska viljan. Skipið heldur eina tíðindadeild í sjónvarpinum og eina tíðindadeild í útvarpinum. Núverandi skipan við einari tíðindadeild skapar bara ónøgd. Tá tað sansar at peningaliga, situr tíðindaleiðarin sum lús millum tvær negl og noyðist at velja, hvør skal niðurlagast. Í núverandi leiðslu er eingin, sum hevur royndir við sjónvarpstíðindum, og tað merkist eisini. Sum skilið á stovninum er nú, og sum politiska støðan er, er eingin ivi um, at tað er neyðugt við tveimum tíðindaleiðarum við hvør sínum pengaposa á stovninum fyri at tryggja góðskuna og vavið á bæði útvarps- og sjónvarpstíðindum.
- Eitt journalististiskt arbeiðspláss má sleppa til arbeiðis, tá ið tingini henda. Vit kunnu ikki gera okkara arbeiði til lítar, um vit bara kunnu arbeiða innan eitt strangt avmarkað vaktarskema. Vit krevja, at ressursir vera fluttar til tíðindaflutningin alt fyri eitt.
- Savnið øll sjónvarpsfólk undir sama taki. Rúm er ikki fyri øllum í Sortudíki, og tískil mæla vit til, at øll sjónvarpsframleiðsla aftur verður savnað í M.A Winthersgøtu. Tað hevur við sær, at vit kunnu samstarva um at fáa meira sjónvarp á skíggjan.
- Kringvarp Føroya er sett í verðina at vera til gagns fyri Føroya Fólk. Tí krevja vit, at leiðslan kemur við einari veruligari ætlan fyri Kringvarp Føroya. Rok hava vit havt nokk av – kann leiðslan ikki skapa frið og vísa vegin, má hon leggja frá sær.
- Leiðslu- og deildarbygnaðurin má broytast soleiðis, at tað ber til at fáa sjónvarp á skíggjan. Sum støðan er nú, er tað einans leiðarin á dokumentardeildini, sum hevur sjónvarpsroyndir, og hon er flutt úr M.A Winthersgøtu. Stjóri, tíðindaleiðari og programmleiðari hava milllum onga og sera avmarkaða vitan um sjónvarp. Vit kunnu ikki longur góðtaka, at leiðslan framhaldandi uppraðfestir útvarp fram um sjónvarpsframleiðsluna. Kravið má vera ein bygnaður, sum skil er í.
- Um ikki leiðslan er før fyri at ganga okkara ynskjum á møti og skapa ein betur bygnað, noyðast vit at krevja, at stovnarnir fara sundur aftur.

Støðan í sjónvarpinum er nú so ring, sum hon aldrin áður hevur verið. Fólk eru óð, frustrerað, kedd, og líkasælan er nú farin at merkjast. Tað er serliga hugstoytt, tá ið vit vita, at leiðslan hevði fullan stuðul, tá ið hon tók við. Hetta er seinasti møguleiki, um ikki leiðslan longu hevur spilt sín møguleika fyri at fáa frið á stovninum.

Vinarliga

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Hugo Gardar | Høgni í Jákupsstovu | Ingolf S. Olsen |
| Kaj Joensen | J. Herluf Sørensen | Sigrún Brend |
| Rúni F. Kjær | Malan Johannesen | Bjarnheðin í Hoyvík |
| Bogi Godtfred | Ragnar A. Jacobsen | Jógvan Eli Dam |
| Bárður Veihe | Páll Danielsen | Guðrið Rubeksen |
| Jóna Dalsgarð | Jógvan Páll Johannesen | Carsten Arnskov |
| Erla Zachariassen | Johnsigurd Johannesen | Hallur E. Thomsen |
| Katrin Streymoy | Robert á Stongum | Mathias Samuelsen |
| Tórður Mikkelsen | Bjørg Mohr Anderssen | Regin Toftegaard |
| Øssur Hjalt | | |